# ALUFELGUR



STÓRT ÚRVAL AV DEKKUM OG ALUFELGUM

Dømi: 4 felgur 15" og 4 dekk 195/50x15

EINANS 5.900,-

Sosialurin - 311820

ES P/f Esmar Simonsen

Kambsdalur
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29
E-mail: es@es.fo



## Frá Happadráttinum

**Seinasti søludagur til 3. drátt** er hósdagin 18. mai.

| Størstu vinningar | |
|---|---|
| 1x | 250.000 kr. |
| 1x | 75.000 kr. |
| 1x | 60.000 kr. |
| 1x | 30.000 kr. |
| 2x | 25.000 kr. |
| 3x | 15.000 kr. |
| 7x | 10.000 kr. |
| 15x | 5.000 kr. |
| Eykavinningur | 15.000 kr. |

**Ágóðin av Happadráttinum: 1/3 fer til ÍSF og 2/3 fara í grunn, ætlað brekaðum**

HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN



## 1. uppstillingarfundur til býráðsvalið



1. uppstillingarfundur til býráðsvalið til Tórshavnar býráð verður á Hotel Hafnia mánakvøldið 8.5.2000 kl. 19.30

SUÐURSTREYMOYAR TJÓÐVELDISFELAG



## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53



**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*


Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið

## Til feløg v.m.

### Innlatingarfreistir viðv. sjálvuppgávum og roknskapum

Sjálvuppgávur og roknskapir viðvíkjandi árinum 1999 hjá deyðsbúgvum, feløgum, felagsskapum v.m. við roknskaparskyldu skulu vera **økisskrivstovunum** hjá Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

**1. juni 2000**

um roknskaparskeið teirra endar í ella fellur saman við álmannakkaárinum 1999.

Sjálvuppgávan verður roknað at vera innlatin rættstundis, tá hon er fingin Toll- og Skattstovu Føroya ella er latin í postin í seinasta lagi omanfyri nevnda innlatingardag. Fellur innlatingardagurin á ein leygardag, sunnudag ella halgidag, verður seinasti innlatingardagur fyrsta eftirfylgjandi gerandisdag.

### Ber til at leingja freistina?

Tá serlig grund er til tess, kunnu økisskrivstovurnar leingja freistina til 15. august 2000, treytað av at

- umsóknin er skrivlig
- umsóknin er send áðrenn **1. juni 2000**
- sjálvuppgávur og roknskapir fyri eldri ár eru innkomin.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**
Heimasíða: www.tollskatt.fo

Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið

## Til privat vinnurekandi

### Innlatingarfreistir viðv. sjálvuppgávum o.ø.

Sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir viðvíkjandi árinum 1999 hjá privatum vinnurekandi við roknskaparskyldu skulu vera **økisskrivstovunum** hjá Toll- og skattstovuni í hendi sum tilskilað niðanfyri:

| Føðingardagur: | Seinasti innlatingardagur: |
|---|---|
| 1/1-28/2 | 1/4-2000 |
| 1/3-30/4 | 1/5-2000 |
| 1/5-30/6 | 1/6-2000 |
| 1/7-31/8 | 1/7-2000 |
| 1/9-31/12 | 15/8-2000 |

Um báðir hjúnafelagar hava skyldu at føra roknskap, kunnu báðir lata inn sambært tí freist, sum er galdandi fyri tann hjúnafelagan, sum hevur tann seinna føðingardagin.

Sjálvuppgávan verður roknað at vera innlatin rættstundis, tá hon er fingin Toll- og Skattstovu Føroya ella er latin í postin í seinasta lagi omanfyri nevnda innlatingardag. Fellur innlatingardagurin á ein leygardag, sunnudag ella halgidag, verður seinasti innlatingardagur fyrsta eftirfylgjandi gerandisdag.

### Ber til at leingja freistina?

Tá serlig grund er til tess, kunnu økisskrivstovurnar leingja freistina til 15. august 2000, treytað av at

– umsóknin er skrivlig
– umsóknin er send **áðrenn nevndu freistir eru farnar**
– sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir fyri eldri ár eru innkomin.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**
Heimasíða: www.tollskatt.fo



## HYGG & HOYR

Fríggjadagur 5. mai

# Føroyskur tónatindur

*Ein av nýggju sendingunum, sum Rás 2 sendir úr Klaksvík, er Poptop-listin, sum er ein tónleikatindur fyri føroyskan tónleik*

JÁKUP MØRK

Tað eru teir báðir, Gunnar Nolsøe og Fróði Løkságarð, sum standa fyri sendingini, sum er at hoyra hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00

Talan er um eina tónleikasending, har lurtararnir sjálvir eru við til at avgera innihaldið, tí tónleikatindurin verður settir eftir, hvussu lurtararnir hava atkvøtt.

**Atkvøða á netinum**

Atkvøðugreiðslan er skipað á tann hátt, at ttú trýstir teg inn á heimasíðuna fyri sendingina, www.pegasus.fo/poptop.

Á heimasíðuni eru í løtuni eini 15 løg, sum veljast kann ímillum, men ætlanin er so at hetta skal víðkast, soleiðis at talan verður um eini 30 løg, umframt eykaløg, sum atkvøðast skal um.

Hevur tú ikki atgongd til alnetið, ber eisini til at atkvøða. Í næstum verður atkvøðuseðil eisini prentaður í Sosialinum, soleiðis at øll kunnu fáa atgongd til atkvøðugreiðsluna.

**Ikki bara nýtt**

Umframt, at sendingin sostatt sendir nakað av tí nýggjasta, sum er at hoyra innan føroyskan tónleik, so er eisini ætlanin, at rúmd skal verða fyri einum sonevndum klassikara í hvørjari sending, soleiðis at sendingin gjørt nakað breiðari.

Eisini er ætlanin, at ein profilur verður gjørdur av onkrum einstaklingi í føroyska tónaheiminum, og væntandi verður her roynt at taka fram fólk, sum á einhvønn hátt eru aktuell. Antin við fløguútgávum ella á annan hátt.



*Fróði Løkságarð og Gunnar Nolsøe leggja føroyska hittlistan til rættis*

## ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Vaanaligt

Sum ummælari kenni eg, at eg má vera serliga vakin í vikuni, sum eg havi ábyrgdina av. Sjálvdan havi eg havt so góða tíð at fylgt við sum hesa vikuna. Páskadagarnir eru so nógvir, og tað hevur verið beinleiðis vetrarveður, so tað skuldi verið lagamanni at sæð og hoyrt okkurt at ummælt.Tíverri má eg siga, at páskini hava verið eitt stórt vónbrót í so máta fyri meg.

Eg leyp næstan allar andaligu sendingarnar um, og so var ikki serliga nógv eftir á skránni. Barnasendingar vóru ikki fleiri enn vanligt, og hæddarpunktið í vikuni, Likkulikkileia, var ikki á skránni. Onkur góður filmur var, men ongin spenningsrøð, sum annars hevði verið sera hóskandi so nógvar frídagar á rað.

**Hvør er Elian**

Serliga er tað vánaligi tíðindaflutningurin, sum hevur argað meg. Tað hava als ongar tíðindasendingar verið í SvF frá týsdegi í stillu viku til hóskvøld eftir páskir - átta dagar á rað. Tað er ov vánaligt. Sjálvandi skulu fólkini í SVF eisini hava páskafrí, men verðin stendur altso ikki í stað, hóast tað eru páskir. Á øðrum arbeiðsplássum skiftast fólk um at vera til arbeiðis um høgtíðirnar.

ÚF hevur sínar føstu tíðindasendingar, eisini halgidagar, men tað er sera ymiskt, hvussu tíðindaflutningurin er. Tað sær út til, at starvsfólkini brúka mestu tíðina at lesa útlendsk tíðindir halgidagar. At døma eftir valinum av tíðindum, tulka tey hugtakið tíðindir sera ymiskt. Flestu tíðindafrásagnirnar um páskirnar hava verið um neyðars Elian. Sjálvandi er hetta ein sorgarsøga, men álvaratos mátti okkurt verið av størri týdningi fyri okkum her enn hesin 6 ára gamli drongurin. Hvussu við børnum í Føroyum, hvørji eru útlitini fyri, at tey koma aftur í skúla eftir páskir, hvat hendir um Lærarafelagið vrakar semingsuppskotið? Tað hevur meira at siga fyri flestu fólk í Føroyum, enn ein kubanskur drongur, sum er fangaður í einum stórpolitiskum leiki. Um tað er so umráðandi at greiða frá lagnuni hjá Elian, so átti meira at verið gjørt burturúr bakgrundini fyri øllum stríðnum.

**Ov tunt**

ÚF lýsti í fleiri dagar við einum nýskrivaðum útvarpsleiki, sum m.a. var um kreppuárini, so tað var við spenningi, eg setti meg at lurta fyrsta páskadag. Her skuldi verið nokk av inspiratión at tikið av og gjørt burturúr. Tíverri haldi eg ikki at leikurin livdi upp til umtaluna. Hví ÚF gjørdi so nógv burturúr hesum leikinum skilji eg ikki. Leikurin var ikki nýskapandi á nakran hátt, var onki spennandi og heldur ikki serliga væl spældur. Ein rúgva av hóvastáki var rundan um eina søgu um fíggjarligt svik, men hon druknaði í øllum ruðuleikanum. Í staðin snúði samrøðan seg um trupulleikar og svik í hjúnalagnum hjá høvuðsleikarunum. Eg haldi meg vanliga ikki verða erkvisna málsliga, men eg undraðist á ljóta málburðin – skilti snøgt sagt ikki endamálið við øllum eiðunum og ókvæmisorðum.

Tað eru so nógv góðir útvarpsleikir skrivaðir, at tað mátti borið til hjá ÚF at funnið ein betri enn handan, í Føroyum ella aðra staðni.

**Á ferð við Tora Tourist**

Umboð fyri føroysku fjølmiðlarnar vóru herfyri boðin á sjarmuferð við einum cruiseskipi í miðjarahavinum. Uttan at leggja meg stórvegis útí kjakið um, hvørt tað er sømiligt at gera sendingar/greinar aftaná ein slíkan túr, so havi eg hug at koma við nøkrum viðmerkingum. Eg royndi at hoyra sendingarnar í ÚF, men komin gjøgnum góða hálva sending langafríggjadag, kom eg til ta niðurstøðu, at eg onki fekk at vita, sum ikki stóð í einum leksikon. Nakað ta somu kensluna hevði eg, tá eg hugdi at seinnu sendingini í SvF. Fyrru sá eg ikki.

Tá farið verður út í heim, haldi eg tað vera mest áhugavert at hoyra um viðurskifti, sum bara fólkini á staðnum kunnu greiða frá. Hvat fjølmiðafólk í Føroyum kunnu siga hvør øðrum er ikki serliga áhugavert. SvF hevði fatur á onkrum, tá tosað varð við Hannu, sum hevur búð í Jerusalem í nógv ár, men ikki nokk til at tað kundi bera sendingina.

**Bati at hóma**

Páskaskráirnar hjá ÚF og SvF ikki vóru nakað at reypa av. Tíbetur er nógv annað at fáast við, enn at sita og lurta eftir útvarpi ella hyggja at sjónvarpi um páskirnar.

Longu mikudagin haldi eg at ÚF og SvF fótaðu sær væl aftur. ÚF við fyrstu fótbóltsfrásøgnini longu kl. 7.30 og beinleiðis dysti seinnapartin, og SvF við einum áhugaverdum Krosskasti um samráðingar á arbeiðsmarknaðinum.



**Annika Joensen, setursskrivari, skrivar**

ÚTsjón — Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN